## Ísland stendur sterkari

Avgerðin hjá íslendska Altinginum at hava fólkaatkvøðu um Icesave-málið hevur styrkt støðu Íslands í samráðingunum við bretar og niðurlendingar um eina nýggja vatalu um Icesave-skuldina. Tað heldur í hvussu er formaðurin í Sjálfstæðisflokkinum, Bjarni Benediktsson. Hann vísir á, at sambært meiningakanningum hevur fólkið ikki somu hugsan sum stjórnin í Icesave-málinum, og tað hevur styrkt samráðingarstøðu Íslands, sigur hann. Hann vil ikki siga, um fólkaatkvøðan skal haldast, sjálvt um tað skuldi eydnast at fáa eina avtalu við bretar og íslendingar innan leygardagin.



# Havnar sjúkrakassi fekk 123 ár

**Seinasta fríggjadag var seinasti avgreiðsludagur hjá Havnar Sjúkrakassa. Kl. 13 lat hann aftur eftir at hava virkað síðan 1886**

*Óli Jacobsen*

Vit vóru inni á gólvinum hendan seinasta dagin hjá sjúkrakassanum og fingu eitt prát við nøkur av starvsfólkunum. Tað var sjálvsagt við sorgblídni, at lykilin varð snaraður um seinasta ferð.

Ikki bert var hetta ein drúgvur partur av føroysku samfelagssøguna, sum fór í søguna. Men hjá starvsfólkunum hevur hetta eisini verið ein stórur partur av teirra lívi. Tey hava arbeitt í sjúkrakassanum 20-25 ár. Hann hevur tískil verið eitt gott arbeiðspláss, sum tey nú eru uppsøgd úr.

Tað er eingin ivi um, at sjúkrakassarnir hava havt ein ovustóran týdning fyri fólkið í Føroyum, og fara vit at nýta høvið at greiða eitt sindur frá teirra søgu.



*Tær hava júst latið aftur seinastu ferð í 133 ára virkseminum hjá Havnar Sjúkrakassa. F.v. Anna Højgaard, Una Johansen og Conny Mikkelsen. Umframt hesar tríggjar arbeiddu Herman Dam, leiðari, og Flemming Poulsen á skrivstovuni*

### »Tey frísku skulu rinda fyri tey sjúku«

Teir fyrstu sjúkrakassarnir tóku seg upp í Danmark aftaná 1850, og teir vóru grundaðir á, at "tey frísku skuldu rinda fyri tey sjúku."

Fyrstu ferð spurningurin um sjúkrakassar kemur upp í Føroyum er á fundi í Thorshavns Totalafholdsforening í 1885, men tá skuldi sjúkrakassi bert vera fyri egnar limir. Meira hendi ikki tá.

Í 1886 verður spurningurin um sjúkrakassa tikin upp á fundi í Thorshavns Arbejderforening. Hugskotið fær stóra undirtøku, og samtykt verður at innkalla til almennan fund um málið.

Fyrstu ferð sjúkrakassin alment verður nevndur er í Dimmalætting nr. 49 fyri 4. desember 1886, har tað er soljóðandi lýsing:

**Arbejderforeningen.**
Ekstraordinær General-forsamling afholdes Søndag den 12te December Kl. 5.
Forhandlingsgenstand: Oprettelse af Sygekasse

Thorshavns Arbejderforening var ikki nakað fakfelag sum so, men heldur eitt áhugafelag, sum skuldi skuldi taka sær av sosialum viðurskiftum hjá arbeiðarum.

Tað vóru heldur ikki arbeiðarar, sum stjórnaðu felagnum. Formaður var apotekarin Olaf Finsen, sum eftir at hava virkað sum apotekari í Keypmannahavn hevði sæð, hvønn týdning sjúkrakassarnir høvdu fyri tey, sum vóru ringast fyri í samfelagnum.

Á hesum fundi varð samtykt at seta sjúkrakassa á stovn saman við Thorshavns Totalafholdsforening. Endaliga samtyktin er gjørd á fundi 19. desember 1886, sum verður roknaður sum stovningardagur hjá sjúkrakassanum.

Tað verður sett ein 8 mannanevnd at koma við uppskoti um viðtøkur fyri kassan. Í hesi fyrireikingarnevnd komu:

Nevndarlimir í Thorshavns Arbejderforening: Olaf Finsen, apotekari, H.C. Olsen, keypmaður og P.C. Johannesen, arbeiðstakari.

Nevndarlimir í Thorshavns Totalafholdsforening: C.C. Danielsen, sparkassastjóri, Djóni Isaksen, málari, Eliesar Andreassen, fiskimaður, H.N. Jacobsen, bókahandlari og Ole Mortensen, timburmaður.

Hesir fingu afturat sær: Eliesar Jacobsen, fulltrúa, Jacob Lützen, keypmann og Rasmus Effersøe, blaðstjóra. Hetta hava alt verið menn, sum hava verið so mikið væl fyri, at teir kundu klára seg uttan sjúkrakassa. Men tað var teirra sosiala medvit, sum hevur fingið teir at vera við í hesum arbeiði.

Fyrireikingarnevndin hevur eisini gjørt skjótt av, tí longu tann 2. januar 1887 varð uppskotið til viðtøkur lagt fram. Á hesum fundi verður eisini samtykt, at fyri at sjúkrakassin kundi koma at virka, skuldu vera 50 limir. Tað gingu bert fáir dagar, tá vóru 54 limir teknaðir.

Tann 16. januar var stovnandi aðalfundur í almúguskúlanum úti á Reyni. Møttir vóru 26 limir. Endurskoðað uppskot til viðtøkur varð samtykt. Síðan varð vald nevnd og grannskoðarar.

Í nevndina komu Djóni Isaksen, i Geil, R.C. Effersøe, H.C. Olsen, Jacob Lützen og Ole Mortensen.

Grannskoðarar vóru: A.W. Restorff, keypmaður, og lærarin C.L. Johannesen. Aftaná skipaði nevndin seg við Djóna Isaksen sum formanni og Rasmus Effersøe sum kassameistara.

### Virkaði sum dagpengaskipan

Í viðtøkunum varð ásett, hvussu sjúkrakassin skuldi